# ÁRSROKNSKAPUR 1999

## RAKSTRARROKNSKAPUR

1. januar - 31. desember

| DKK | 1999 | 1998 |
|---|---|---|
| **Tryggingargjøld** | | |
| Tryggingargjøld brutto | 255.657.933 | 250.812.814 |
| Endurtryggingargjøld | -50.507.621 | -49.710.257 |
| Broyting í avsettum tryggingargjøldum brutto | -1.537.692 | 3.081.392 |
| Broyting í avsettum tryggingargjøldum hjá endurtryggjarum | -88.135 | 177.187 |
| **Tryggingargjøld** | **203.524.485** | **204.361.136** |
| 8% Seravsláttur | 0 | -20.031.951 |
| **Tryggingargjøld netto** | **203.524.485** | **184.329.185** |
| **Rentuinntøka av tryggingarvirksemi** | **5.853.384** | **6.060.263** |
| **Skaðaendurgjøld** | | |
| Útgoldið fyri skaðar brutto | -146.401.787 | -154.285.305 |
| Endurtryggjaranna partur | 6.053.398 | 26.952.891 |
| Broyting í avsettum skaðaendurgjøldum brutto | -43.544.641 | 17.592.328 |
| Broyting í avsettum skaðaendurgjøldum hjá endurtryggjarum | 11.483.404 | -15.246.200 |
| **Skaðaendurgjøld netto** | **-172.409.626** | **-124.986.286** |
| **Rakstrarútreiðslur av tryggingarvirksemi** | | |
| Nýtekningarútreiðslur | -397.663 | -2.068.042 |
| Fyrisitingarútreiðslur | -59.330.120 | -56.132.975 |
| Ómaksløn og avlopsbýti frá endurtryggjarum | 5.475.759 | 4.700.194 |
| **Rakstrarútreiðslur av tryggingarvirksemi netto** | **-54.252.024** | **-53.500.823** |
| **ÚRSLIT AV TRYGGINGARVIRKSEMI** | **-17.283.781** | **11.902.339** |

| DKK | 1999 | 1998 |
|---|---|---|
| **Inntøkur av íløguaktivum** | | |
| Vinningur av kapitalpørtum í tilknýttum fyritøkum | 298.470 | 247.154 |
| Fastogn | 1.577.220 | 1.894.596 |
| Rentur og vinningsbýti v.m. | 81.739.209 | 75.383.034 |
| Staðfestur vinningur av íløguaktivum | 0 | 5.559.768 |
| **Inntøkur av íløguaktivum tilsamans** | **83.614.899** | **83.084.552** |
| **Ikki staðfestur vinningur av íløguaktivum** | **4.879.774** | **7.780.635** |
| **Útreiðslur av íløguaktivum** | | |
| Fyrisitingarútreiðslur | -1.105.317 | -1.334.162 |
| Rentuútreiðslur | 0 | 0 |
| Staðfest tap av íløguaktivum | -16.257.958 | 0 |
| **Útreiðslur av íløguaktivum tilsamans** | **-17.363.275** | **-1.334.162** |
| **Ikki staðfest tap av íløguaktivum** | **0** | **0** |
| **Renta flutt til tryggingarvirksemi** | **-5.853.384** | **-6.060.263** |
| **ÚRSLIT AV ÍLØGUAKTIVUM TILSAMANS** | **65.278.014** | **83.470.762** |
| Aðrar vanligar inntøkur | 1.225.493 | 1.024.716 |
| Aðrar vanligar útreiðslur | -2.353.135 | -1.597.238 |
| **ÚRSLIT ÁÐRENN SKATT V.M.** | **46.866.591** | **94.800.579** |
| Óvanligar inntøkur | 0 | 433.645 |
| Óvanligar útreiðslur | 0 | -7.743.700 |
| **ÚRSLIT ÁÐRENN SKATT** | **46.866.591** | **87.490.524** |
| Skattur | -1.085.103 | -25.952.041 |
| **RAKSTRARÚRSLIT** | **45.781.488** | **61.538.483** |

## FÍGGJARSTØÐA

31. desember

**Aktiv**

| DKK | 1999 | 1998 |
|---|---|---|
| **Íløguaktiv** | | |
| **Fastogn** | **61.366.018** | **61.141.536** |
| **Kapitalpartar** | | |
| Kapitalpartar í tilknýttum fyritøkum | 16.061.882 | 15.763.412 |
| Kapitalpartar í øðrum fyritøkum | 6.424.480 | 5.043.240 |
| **KAPITALPARTAR TILSAMANS** | **22.486.362** | **20.806.652** |
| **Fíggjarløgur** | | |
| Lánsbrøv | 756.670.789 | 697.071.929 |
| Útlán | 289.123.463 | 299.350.755 |
| Innlán | 170.868.692 | 196.010.939 |
| **FÍGGJARÍLØGUR TILSAMANS** | **1.216.662.944** | **1.192.433.623** |
| **ÍLØGUAKTIV TILSAMANS** | **1.300.515.324** | **1.274.381.811** |
| **Áogn av tryggingarvirksemi** | | |
| Hjá tryggingartakarum | 9.060.145 | 8.492.393 |
| Hjá tryggingarfeløgum | 4.785.839 | 3.258.248 |
| **ÁOGN AV TRYGGINGARVIRKSEMI TILSAMANS** | **13.845.984** | **11.750.641** |
| **Onnur aktiv** | | |
| Innbúgv, EDV-útgerð, akfør v.m. | 8.769.833 | 8.370.607 |
| Annað | 63.639 | 183.731 |
| **ONNUR AKTIV TILSAMANS** | **8.833.472** | **8.554.338** |
| **Tíðaravmarkingar** | | |
| Rentur og leiga tilgóðar | 16.585.751 | 12.267.397 |
| Aðrar tíðaravmarkingar | 3.065.386 | 2.898.456 |
| **TÍÐARAVMARKINGAR TILSAMANS** | **19.651.137** | **15.165.853** |
| **AKTIV TILSAMANS** | **1.342.845.917** | **1.309.852.643** |

**Passiv**

| DKK | 1999 | 1998 |
|---|---|---|
| **Eginogn** | | |
| **EGINOGN TILSAMANS** | **1.116.369.007** | **1.070.587.518** |
| **Tryggingartekniskar avsetingar** | | |
| Avsett tryggingargjøld | | |
| Avsett brutto | 30.638.344 | 29.100.653 |
| Endurtryggjaranna partur | -2.203.846 | -2.291.981 |
| **Avsett tryggingargjøld netto** | **28.434.498** | **26.808.672** |
| Avsett skaðaendurgjøld | | |
| Avsett brutto | 170.486.370 | 126.942.328 |
| Endurtryggjaranna partur | -23.502.914 | -13.622.642 |
| **Avsett skaðaendurgjøld netto** | **146.983.456** | **113.319.686** |
| **TRYGGINGARTEKNISKAR AVSETINGAR TILSAMANS** | **175.417.954** | **140.128.358** |
| **Aðrar avsetingar** | | |
| Avsett til eftirlønarskyldur | 10.236.006 | 11.496.691 |
| **AÐRAR AVSETINGAR TILSAMANS** | **10.236.006** | **11.496.691** |
| **Skuld** | | |
| Skattur | 1.085.103 | 26.462.115 |
| Annað | 31.547.855 | 46.087.969 |
| Avsett til samanleggingarútreiðslur | 8.189.992 | 15.089.992 |
| **SKULD TILSAMANS** | **40.822.950** | **87.640.076** |
| **PASSIV TILSAMANS** | **1.342.845.917** | **1.309.852.643** |

## STJÓRN

**Jens Peter Arge,** forstjóri
**Gunnar í Liða,** stjóri
**Mortan Poulsen,** stjóri

## NEVNDARLIMIR

**Jógvan Durhuus,** formaður
**Trygvi Guttesen,** Næstformaður
**Birgir Mohr,** 2. næstformaður
Jógvan Lützen
Arngerð Persson
Ronald Poulsen
Anna Maria Simonsen
Emil Simonsen
Jákup Sólstein

## GRANNSKOÐARA-ÁTEKNING

Vit hava grannskoðað ársroknskapin, greiddur av leiðsluni, fyri Tryggingarfelagið Føroyar fyri árið 1999.

## UM GRANN-SKOÐANINA

Í samsvar við alment viðurkendar grannskoðanarreglur er grannskoðanin skipað og framd við tí endamáli at fáa eina grundaða sannføring um, at tað ikki eru týðandi feilir ella vanta týðandi upplýsingar í roknskapinum. Undir grannskoðanini hava vit, eftir meting um týdning og risiko, kannað grundarlag og prógv fyri upphæddir og aðrar upplýsingar í roknskapinum. Vit hava samstundis tikið støðu til roknskaparháttin og roknskaparligu metingarnar, sum leiðslan hevur gjørt, eins og vit hava mett, um upplýsingarnar í roknskapinum sum heild eru nøktandi.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

## NIÐURSTØÐA

Tað er okkara fatan, at árskroknskapurin er greiddur í samsvar við roknskaparkrøv í lóggávuni, og at hann gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ogn og skuld, figgjarligu støðu og úrsliti.

Tórshavn, tann 24. mars 2000

**Rasmussen & Weihe P/F**
Statsaut. grannskoðarafelag
Klaus Rasmussen /
*statsaut. revisor*
Joen Magnus Lamhauge
*reg. revisor*

**Grannskoðaravirkið INPACT P/F**
Jógvan Amonsson /
*statsaut. revisor*
Jógvan Joensen
*cand. merc. aud.*

Ársroknskapurin er styttur. Fullfiggjaður árskroknskapur er atkomuligur hjá Tryggingarfelagnum Føroyar og tí føroyska skrásetingarmyndugleikanum.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR



# Klaksvíkingar byggja eldraíbúðir

*Klaksvíkar kommuna hevur tikið stig til nýskapandi íbúðarverkætlan, sum fer at kosta millum 20 og 30 milliónir krónur, tá hon er liðug*

EYÐUN KLAKSTEIN

Fríggjadagin var fyrsti partur av arbeiðinum av verkætlanini undir Kráarbrekku boðin út í bløðunum, og ætlanin er, at arbeiðið at gera eldraíbúðir í Klaksvík skal setast í gongd í ár.

Fríggjadagin var eisini tíðindafundur í Klaksvík, har tey, sum hava fyrireikað ætlanina, greiddu frá.

Klaksvíkar kommuna tók stig til verkætlanina í 1996, tá ein arbeiðsbólkur varð sendur til Íslands at kanna viðurskiftini har. Tvey ár seinni var ein nevnd sett at arbeiða víðari við málinum. Og tað er hendan nevndin, sum nú er komin á mál og kann fegnast um, at arbeiðið verður sett í verk í ár.

Í nevndini sita Elspa Lutzen, Katrin Næs, Erik Andreasen, Jóannes Dalsgarð og Jógvan við Keldu.

### Broyttur hugburður millum eldri fólk

Verkætlanin undir Kráarbrekku umfatar 54 eldraíbúðir, eldrasambýli og felagshøli. Í fyrstu syftu verða 24 eldraíbúðir bygdar, men ætlanin er,at alt skal standa liðugt í 2002.

- Hetta hevur verið eitt drúgt arbeiðið, og ætlanin er nógv broytt, síðani vit byrjaðu. Men talan er um eitt pilotprojekt, og vit vóna, at tað verður líka væl eydnað, sum tað hevur verið drúgt, segði Jógvan við Keldu, býráðsformaður í Klaksvík á tíðindafundinum fríggjadagin.

Stjórin fyri Húsalánsgrunnin, Jóannes Dalsgarð, segði, at talan var um eitt nýtt tiltak í Føroyum.

- Hugburðurin hjá eldri fólki er broyttur. Tey vilja gjarna búgva í smærri íbúðum heldur enn í stórum húsum, sum tey ikki hava orku at halda viðlíka, segði Jóannes Dalsgarð.

### Livandi umhvørvi

Og sambært teimum, sum varða av eldraøkinum í Klaksvík, er stórur áhugi fyri eldraíbúðunum.

Tað vera fólk, sum eru oman fyri 60 ár, og sum kunnu klára seg sjálvi, sum kunnu fáa eldraíbúð undir Kráarbrekku. Í búðirnar verða gjørdar soleiðis, at eingir trupulleikar vera hjá rørslutarnaðum og fólki í koyristóli at sleppa til og frá.

Íbúðirnar var ávíkavist 50 og 70 fermetrar.

Umframt íbúðirnar verður eitt eldrasambýli við 16 búð og umlættingarplássum bygt, og eini felagshøli verða eisini

- Vit hava gjørt nógv burtur úr, at trivnaður í økinum skal vera góður, tí vit ætla ikki bara at parkera tey eldru fólkini undir Kráabrekku. Tey skulu hava tað gott og trívast, og umhvørvið skal vera livandi, segði Jógvan við Keldu.

### Bøtir um húsaneyðina

Íbúðirnar verða leigaðar út, og tað verður fyri eina rímuliga leigu, sum pensjónin skal kunna klára.

At eldri fólk fara at flyta í íbúðirnar fer at bøta um stóru húsa- og íbúðarneyðina, sum í løtuni er millum yngru fólkini í Klaksvík.

Fíggingin av verkætlanini undir Kráarbrekku verður 15% við eginpeningini og restin við láni.

Fyrstu íbúðirnar skulu standa lidnar í í apríl mánaði 2002. Seinni sama ár skal restin av verkætlanin eisini verða liðugtbygt.

Samanlagt fer verkætlanin at kosta millum 20 og 30 milliónir krónur.

*Verkætlanin undir Kráarbrekku umfatar 54 eldraíbúðir, eldrasambýli og felagshøli. Í fyrstu syftu verða 24 eldraíbúðir bygdar, men ætlanin er,at alt skal standa liðugt í 2002*

**Mynd: JH**